# Vøllurin í Gøtu er klárur

**Nýggja graslíkið í Gøtu verður tikið alment í nýtslu komandi mikudag**

GRASLÍKI
*Jákup Mørk*

Nøkur ár eru nú liðin, síðani fyrstu graslíkisvøllirnir vórðu lagdir í Føroyum, og kring landið er nú spakuliga komið gongd á arbeiðið at skifta hesar. Tað er jú soleiðis, at vøllirnir ikki hava óavmarkaða livitíð, og millum annað eru vøllirnir í bæði Klaksvík og Havn skiftir út.



*Arbeiðið við at leggja nýtt graslíki í Gøtu hevur gingið sera væl, og mikudagin verður vøllurin tikin alment í nýtslu, tá B68 kemur á vitjan í útsetta 1. deildardystinum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

## Gingið skjótt

Seinastu góðu vikuna hava týskarar verið í Gøtu, har arbeitt hevur verið við at skifta graslíkið, sum nú var vorðið 13 ára gamalt. Tá vøllurin varð lagdur, varð sagt, at roknast kundi við einari livitíð upp á 10 ár, so sigast kann, at gamla graslíkið, har m.a. fýra føroyameistaraheitið eru vunnin til bygdina, hevur tænt fyri seg. Roknað verður annars við, at nýggi vøllurin hevur eina livitíð upp á 15 ár.

Svenn Olsen, formaður í GÍ, sigur, at arbeiðið við at skifta vøllin hevur gingið upp á stást. Hóast tveir dagar eru dotnir burtur ímillum, orsakað av regni, hevur arbeiðið gingið bæði skjótt og væl, og eftir átta arbeiðsdøgum er at kalla leyst og liðugt. Hósmorgunin vóru onkrir smávegis snøklar eftir, men roknað verður við, at dysturin hjá 2. deild móti HB kann avgreiðast uttan trupulleikar leygardagin.

Almenn verður vøllurin tó ikki tikin í nýtslu fyrr enn komandi mikudag, tá útsetti dysturin millum GÍ og B68 í 1. deild er á skránni. Svenn sigur við Sosialin, at allar helst verður okkurt smávegis gjørt burturúr, men at hann ikki rættiliga veit, hvat hetta fer at verða.

## Væl nøgdir

Leikararnir hjá GÍ hava longu vant tvær ferðir á vøllinum, og sum skilst eru menn sera væl nøgdir um nýggja undirlagið. Sagt verður, at hetta í nógv størri mun líkist grasi. Bólturin ferðast spakuligari, liggur at kalla oman á stráunum, og alt í alt tykjast eginleikarnir at vera nógv náttúrligari enn á gamla vøllinum.

Talan er eisini um eitt nýtt slag av vølli. Sonevndir 3. ættarliðsvøllur, sum í løtuni verða royndir ymsa staðni í Europa. Í UEFA tykist nøgdsemið um hetta slagið av vøllum at vera somikið stórt, at teir í løtuni kanna, um tað kann lata seg gera at góðkenna hesar til altjóða nýtslu.

## Eisini aðrastaðni

Nú arbeiðið í Gøtu er um at vera liðugt, eru tey eisini farin í holt við at skifta graslíkið í Runavík.

Arbeiðið her er kanska nakað størri, tí áðrenn sjálvt graslíkið kann skræðast av, skulu tey 300 tonsini av sandi, sum eru á vøllinum súgvast av. Tá vit hósmorgunin fregnaðust í Runavík frættist, at umleið helmingurin av sandinum var sogin upp, og at nakað av graslíkinum somuleiðis var tikið.

Fremsta mansliðið´hjá runavíkingum skuldi eftir ætlan spælt heimadyst móti B71 komandi sunnudag, men orsakað av arbeiðinum á vøllinum, verður hesin dystur ístaðin leiktur á Sandi.

Sum nevnt omanfyri, so hava klaksvíkingar longu skift sín vøll einaferð, men eisini har skal nýggja slagið av graslíki leggjast á. Orsøkin til hetta eru trupulleikarnir, sum eru við verandi vølli, tá nógv regn er. Býráðið í Klaksvík togaðist leingi við veitaran av vøllinum um at fáa endurgjald, og úrslitið varð ein semja, soleiðis at nýtt graslíki nú verður lagt á.

Arbeiðið við vøllin í Klaksvík fer væntandi fram í summarsteðginum.

# Hodgson rýmir

**Venjaranum hjá FCK hevur stendur í boði at gerast venjari hjá italska felagnum, Udinese, og hann ætlar ikki at lata møguleikan fara fram við borðinum**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Bert 11 dagar eftir at hann tók ímóti gullmerkjunum fyri DM-heitið, tykist FCK-venjarin, Roy Hodgson, at vera á veg frá donsku meistarunum.

Tíðindastovan, Ritzau, visti hósdagin at siga, at væl lýddi enski venjarin hevur fingið eitt tilboð frá italska Udinese, og at Hodgson hevur gjørt at taka av tilboðnum. Sostatt vrakar onglendirin møguleikan fyri at taka FCK í Champions-League, og fer heldur í holt við at hjálpa Udinese longur upp á stigatalvuna, har liðið í ár endaði heilt niður ímóti niðurflytingarsessunum.

Hetta er ikki follið í góða jørð í felagnum hjá Toda Jónssyni. Roy Hodgson varð fram um aðrar maðurin, sum lyfti FCK úr miðjuni á tindin í donsku superliguni, og einki er tí at siga til, at felagið ikki vil sleppa onglendinginum, sum annars hevur ein tvey ára sáttmála við hvítu leyvurnar.

- Um hann ynskir at bróta sáttmálan, so ger hann tað. Vit kunnu jú ikki halda fast um ein mann, sum ikki tímir at vera hjá okkum, men so má hann eisini taka avleiðingarnar av hesum, sigur stjórin í FCK, Flemming Østergaard við heimasíðuna, onside.dk.

## Stevna

Við hesum sipar stjórin til, at FCK ætlar at stevna bæði Hodgson og Udinese fyri sáttmálabrotið.

Síðani hetta kom fram, hevur dúgliga verið gitt um, hvør komandi venjarin hjá Toda og teimum skal verða. Nøvn sum Hector Cuper og Terry Venables hava verið nevnd, men tað metast sum sera ivasamt, um hesir vilja taka við einum starvi í donsku superliguni.

Meira veruleikakent er heldur gitingin um, at Ståle Solbakken kundi verið eitt evni, men Flemming Østergaard vil ikki stórvegis viðmerkingar til hetta.

- Vit skulu hava ein kapasitet av somu støðd sum Roy Hodgson. Tað er einasta viðmerkingin, sum eg havi til hetta, sigur Flemming Østergaard.

*Bert 11 dagar eftir at hava verið við at vinna DM-gull, hevur Roy Hodgson nú tikið av einum tilboðið um at venja italska Udinese*



# KÍ og ÍF á Tórsvølli

**Seinnu hálvfinalurnar í steypakappingini hjá unglingunum vórðu leiktar mikukvøldið**

STEYPAKAPPING
*Jákup Mørk*

Tórsvøllur leggur gras til eitt slag av generalroynd, tá finalan um Thomas Dam steypið verður leikt komandi mikudag.

FSF hevur nevnliga gjørt av, at unglingafinalan eins og finalan hjá monnum skal spælast á grasinum á Tórsvølli. Um orsøkina til hetta, verður sagt úr FSF, at hetta verður gjørt, fyri líka sum at fáa fastari karmar um sjálvan finaludystin, eins og tignin um hendan kanska eisini verður størri, tá talan er um dyst á veruligum grasi.

Umframt hetta er ein onnur orsøk eisini, at hetta kann koma ungum leikarum, sum hava vónir um at sleppa til útlandið, betri møguleikar í so máta. Tað er ikki ókent, at útlendskir talentskótar hyggja at slíkum dystum, og í so máta er tað ein fyrimunur hjá leikarunum, um dysturin verður leiktur á grasi.

## ÍF og KÍ

Sjálv finalan fer annars at standa ímillum ÍF og KÍ. Hetta gjørdist greitt mikukvøldið, tá seinnu hálvfinalurnar í steypakappingini vórðu leiktar.

ÍF tapti á útivølli 2-0 móti NSÍ, men tá fuglfirðingar høvdu vunnið heimadystin 4-1, var hetta hetta akkurát nóg mikið hjá fuglfirðingunum.

Klaksvíkingar vóru meira ivaleysir, tá teir á heimavølli vunnu seinnu hálvfinaluna móti HB við trimum málum móti ongum. Fyrru hálvfinaluna vann KÍ 2-0, so samlaði sigurin hjá KÍ gjørdist upp á 5-0.

Sum nevnt omanfyri, so verður finalan leikt á Tórsvølli komandi mikudag.



Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3173
Navn: P/F Faroe Real Estate Ltd.
Adressa: 410 Kollafjørður

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 16.05.2001
Viðtøkudato: 16.05.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Kloosterboer Overseas BV, Ijmuiden, Holland og P/F Kloosterboer Terminals Faroe Islands Ltd., Birnugøta 1, 100 Tórshavn (P/F 3005)
Nevnd: Johan Kloosterboer, Trawlwekade 4, P.O. Box 174, 1970 AD Ijmuiden (formaður), Janus Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík og Jógvan P. Lassen, Skotarók 10, 100 Tórshavn.
Stjórn: Janus Norðberg, Ovaragøta 3, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av allari nevndini, av tveimum nevndarlimum saman ella av einum nevndarlimi saman við einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. Revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 16.05.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil við og framleiðslu av øllum slagi av fiski og fiskaúrdráttum. Felagið kann eisini luttaka sum íleggjari í øðrum feløgum, ið hava til endamáls at reka handil við og framleiðslu av fiski og fiskaúrdráttum.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

Scania P93 til sølu



Árg. 1991. Við nýggjari lift. Hevur isoleraðan kassa (Norfig), og er í góðum standi. Til sølu fyri 95.000 kr. v/mvg

Tlf. 314728 ella 219728

KVASiR

Teldan & Eg

Lær grundleggjandi teldunýtslu

*Hetta er skeiðið til tín, ið vil í holtur við at nýta teldu. Eingin forkunnleiki krevst - vit byrja frá grundini.*

**Kvøldskeið:** kl. 19.00 - 22.00
mán 25/6 . hós 28/6 .
mán 2/7 . hós 5/7

S EI S VAN KVASiR AR DANE
TLF 320204
http://kvasir.farodane.fo
FARODANE 04-01

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2958, P/F Føroya Dátusavn, FDS, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Hans Jacob Biskobstø, Mammulág 8, 100 Tórshavn (formaður).
Innkomin sum formaður: Heðin Klæmint Weihe, Marknagilsvegur 64, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Oyvindur Brimnes, Reynsgøta 71, 160 Argir.
Grannskoðari: Farin frá sum grannskoðari: Alexander Samuelsen, skrásettur grannskoðari, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3050, Sp/f Sakin, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 15.05.2001.
Kapitalur: Hækking við kr. 219.000,00 til kr. 299.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 219.000,00 til kurs 100
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Havgrímur Johannesen, Jónas Broncksgøta 48, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Kára Gunna Óladóttir, J. Broncksgøta 48, 100 Tórshavn.
Endamál: Endamál felagsins er, rakstur av matstovu, dansihøli, keyp, søla og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. 2500, Føroya Sparikassi, 100 Tórshavn.

Ábyrgdarpeningur pr. 31.12.2000: Kr. 10.943.000,00
Nevnd:
Farin úr nevndini: Bjarni Joensen, 370 Miðvágur.
Innkomin í nevndina: Finnbogi Niclasen, 380 Søvágur.
Tekningarreglur: Fyri virki sparikassans undirrita tveir stjórar í felag ella ein stjóri saman við nevndarlimi. Harumframt kann formaðurin fyri nevndini undirrita saman við øðrum limi í nevndini.

Skráseting Føroya tann 20. juni 2001

Kristin Balle

www.sosialurin.fo

SMS søkir eftir

húsi í Tórshavn

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434

Útbjóðing

Sunda kommuna bjóðar við hesum út arbeiðið at gera kloak og kantsteinar í sambandi við miðstaðarøkið, ið er í gerð.

Tilfar í sambandi við útbjóðingina kann avheintast á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 25/6 2001 ímóti krossaðum kekki á kr. 500,-, ið verður endurgoldin við avhending av tilboðstilfarinum til kommununa eftir at tilboðini eru opnað.

Tilboðini verða opnað mánadagin 2/7 kl. 14.00 á kommunuskrivstovuni í Norðskála.

Kommunan tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð og øðrum føri at vraka øll.

Norðskála tann 19. juni 2001
Sunda Kommuna
460 Norðskála

Pf. Restorffs ASSU

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo